# Skála tapti tepurt

**Men tað eydnaðist ikki skálamonnum at skjóta fyrsta altjóða málið, tá ið teir vóru í Finnlandi, har Skála formaðurin sigur seg rokna við, at talan var um góða íløgu til restina av kappingarárinum**

INTERTOTO
*Jóannes Hansen*



Mynd: Skála
*Eisini í seinna Inter-Toto dystinum gjørdist talan um tap hjá Skála, men samanlagda avrikið var væl og virðiliga nakað, sum felagið kann standa inni fyri*

Onkuntíð hava tapini á útivølli í Intertoto verið stór. Tað eru tað fleiri føroysk feløg, sum kunnu skriva undir uppá. Sammett út frá tí kom Skála væl frá uppgávuni, tá ið teir sunnudagin vóru í Finnlandi og spældu ímóti Tampere United.

Finska liðið vann 2-0 í Føroyum, og sunnudagin vunnu teir 1-0. Málið skoraðu teir miðskeiðis í 2. hálvleiki, og harvið vunnu teir samanlagt 3-0.

Úr Finnlandi siga skálamenninir, sum ætlaðust at vera aftur í Vágum klokkan tíggju í gjárkvøldið, at mótstøðuliðið tóktist teimum væl stinnari á heimavølli, enn tað var, tá ið teir spældu á Svangaskarði:

- Teir spældu skjótari, og teir nýttu síðurnar nógv. Teir høvdu fleiri málmøguleikar, men teir megnaðu bara at skjóta eitt mál, og tað kunnu vit ikki minst takka stinna málverjanum hjá okkum fyri, sigur Hans Jákup Andreassen, formaður í Skála Ítróttarfelag, úr Helsingfors.

Skálamenn løgdu seg ikki aftur á vøllin at verja. Teir spældu við somu uppstilling, sum teir hava gjørt nógvar tær seinastu ferðirnar, og teir pakkaðu seg ikki niður á egnari hálvu.

- Vit vóru ofta í álopi, og vit høvdu eisini okkara málmøguleikar. Men tíverri megnaðu vit ikki at skjóta fyrsta málið í altjóða dysti, so allir spælararnir hava framvegis møguleika at vera okkara fyrsti altjóða málskjútti, staðfestir Skála formaðurin. Tveir teir størstu møguleikarnir komu, áðrenn Tampere United fekk mál. Bæðio Milic og Bjarni Jørgensen høvdu møguleikar at skjóta mál, men tað eydnaðist ikki.

## Stóran týdning

Skála ferðaliðið fór úr Føroyum hósmorgunin ella morgunin eftir, at teir høvdu vunnið týdningarmikla 2-1 sigurin í Gundadali á HB. Ferðalagið steðgaði í Keypmannahavn inntil fríggjadagin. Eftir flúgvitúrin til Helsingfors koyrdu teir 180 kilometrar til Tampere, og leygardagin høvdu teir tvær venjingar.

Sigurin á HB bar við sær, at Skála er væl fyri í kappingini um heiðursmerkini, altjóða luttøku næsta ár og meistaraskapin, sum Skála enn ikki hevur vunnið. Og Hans Jákup Andreassen heldur, at ferðin til Finnlands eisini fyri restina av kappingarárinum fer at hava týdning fyri avrikini og harvið eisini úrslitini:

- Nú eru vit lidnir við altjóða avbjóðingina á hesum sinni. Vit taptu báðu ferðirnar, og tað var harmuligt, tí mótstøðuliðið var ikki stinnari enn so, at vit kanska kundu havt fingið stig frá teimum. Men eg ivist onga løtu í, at dystirnir ímóti Tampere og ferðin til Finnlands fer at vísa seg at hava týdning fyri samanhaldið millum spælararnar og felagið sum heild, og tað ivist eg ikki í fer at hava týdning.

Umstøðurnar at spæla í Tampere vóru góðar. Har var sól og stilli, og tað kom væl við, at hitastigini ikki vóru fleiri enn 20.

## Ivi um Boga

Einasta minussið við dystinum í Tampere var, at Skála toppskjúttin, Bogi Gregersen, longu eftir átjan minuttir noyddist at taka seg burturúr stríðnum.

- Bogi fekk ein løst í lærið. Enn er ikki heilt greitt, um talan var um vøddaskaða ella ikki. Men tað fer sjálvandi at koma illa við, um Bogi ikki verður førur fyri at spæla í vikuskiftinum, tá ið vit skulu spæla torføra heimadystin ímóti NSÍ, heldur Skála formaðurin.

Skála hevur stinnar skiftisspælarar. Millum hesar er stórspælarin í hondbólti, Sveinur Justinussen, sum loysti Boga Gregersen av.

### FAKTA UM DYSTIN

**Tampere United-Skála 1-0 (0-0)**
1-0: Räsänen 67.
**Skála:** Vlada FILIPOVIC,- 6. Pætur Dam JACOBSEN, 5. Rúni RASMUSSEN, 11. Milic CURCIC Milic, 14. Iulian FLORESCU, 8. Bjarni JØRGENSEN, 16. Pauli G. HANSEN, 7. Nenad STANKOVIC, 9. Hanus THORLEIFSON (3. Jenes Christian GORGONARU, 84.) - 10. Jónhard FREDERIKSBERG (22. Arnhold BERG, 85.), 17. Bogi GREGERSEN (15. Sveinur JUSTINUSSEN, 18.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Eugen VODA, 2. Bárður DANIELSEN, 18. Volmar POULSEN, 19. Rói JACOBSEN
**Gult kort:** Pauli G. Hansen
Tampere samantaldur vinnari við úrslitinum 3-0

# Tríggjar dagar á rað

**Kemur HB víðari í Champions League, skal Tórsvøllur leggja gras til dystir tríggjar dagar á rað. Og tað kann geva trupulleikar, ásannar Poul Michelsen**

TÓRSVØLLUR
*Jákup Mørk*

Tað tykist vera veruligur vandi fyri, at ólavsøkufinalan í ár verður órógvað. Tann vandin hevur sum so verið til staðar, síðani UEFA háttaði sínar spælidagar soleiðis, at UEFA-Cup dystir verða leiktir um ólavsøkumundið, men higartil hevur samanfall ikki verið millum finaluluttakarar og steypafinalistar.

Tað verður tað so heldur ikki í ár, nú GÍ, ÍF, B68 og B71 eru eftirverandi liðini í steypakappingini. Haraftur-ímóti er spurningurin, um Tórsvøllur verður til reiðar at taka ímóti trýstinum, sum verður um ólavsøkuna.

Ólavsøkuaftan eigur B36 nevnliga heimadyst móti íslendska ÍBV. Sjálvandi er møguleiki hjá B36 at biðja um at skifta um heima- og útidyst, men bæði fíggjar- og ítróttarligu útlitini við at spæla ein slíkan dyst á tjóðarhátíð okkara eru helst ov góð til, at ein umbýting kann koma upp á tal. Og tað er heldur einki at ivast í, at havnarmenninir treyðugt vilja fara inn á Toftir at spæla ein slíkan dyst.

Tað merkir, at talan undir øllum umstøðum verður um dyst tveir dagar á rað, og støðan kann enntá gerast enn spentari. Megnar HB at vinna seg víðari móti litaviska Kaunas, so bíðar ein dystur móti Liverpool, og hesin skal so spælast mikudagin 27. juli.

## Vil hava tríggjar dystir

- Eg vóni í øllum førum, at talan verður um tríggjar dystir, sigur Poul Michelsen flennandi, tá vit fingu orðið á hann.

Handan orðini býr millum annað tann veruleiki, at sum íðin HB-viðhaldsmaður ynskir Poul so hjartaliga, at tað skal eydnast HB at spæla seg víðari til stórdystin móti Liverpool. Ein dystur, sum samstundis eisini vildi verið ein góður fongur hjá Tórsvølli sjálvum.

Men hóast hetta, so ásannar formaðurin fyri Tórsvøll sjálvandi eisini, at tað kann geva trupulleikar fyri vøllin, um talan verður um tríggjar dystir í eins nógvar dagar.

- Vit royna sjálvandi at gera okkara besta. Millum annað við at drena vøllin so væl, sum tað nú einaferð ber til. Men her í Føroyum hava vit so eisini nakrar náttúrukreftir, og teimum eru vit altso ikki harrar yvir. Hendir tað, at talan verður um nakrar vátar dagar, so verður vøllurin eisini hareftir. Tað hava vit eisini sæð aðrastaðni, og í so máta eru vit ikki nakað eindømi.

*Heldur tú, at tað kann merkja, at onkur dystur - les steypafinalan - má flytast ella útsetast?*

- Nei. Tað kann eg ikki ímynda mær kemur upp á tal. Uttanlands hava vit jú sæð, at vallir verða nýttir fleiri dagar á rað. Og tá sæst tað eisini á vøllinum. Stutt sagt, so hevur ein vátur vøllur við sær, at talan kann gerast um runudíki, og tað einasta, sum vit kunnu gera, er at fyrireika okkum sum best, sigur Poul Michelsen at enda.



*Tað verður av álvara farið undir at rigga Tórsvøll til nú, so hann verður sum best førur fyri at taka ímóti tveimum ella kanska trimum dystum á rað um ólavsøkuna*